Jacob Andersen:

# Hetta var ver



Hann stendur eftir, sum tann ultimativi vinnarin av Stjørna í eitt kvøld. Í vár og í summar skal hann spæla konsertir, men hóast konsertferð við John Fogerty, egnar konsertferðir og plátuútgávur, so roynir 33 ára gamli Jacob Andersen at halda bæði beinini á jørðini

SAMRØÐA
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*
*Myndir: Símun J. Hansen*

**Eysturbrúgv, Keypmannahavn:** Um kvøldarnar, eftir tað var vorðið myrkt, plagdi Jacob Andersen at taka plátuspælaran og plátuna hjá John Fogerty, Green River, við inn í kamarið. Við einum tennisketsjara í hondini stóð hann so framman fyri vindeyganum og spældi við speglmyndini, at hann var sangari.

Í dag kann hann av røttum eisini kalla seg sangara. Harafturat er hann júst afturkomin av eini konsertferð í Norðanlondum við júst sama manni, sum stendur aftanfyri Green River plátuna. Hansara stóra fyrimynd.

- Eg havi ikki fatað tað enn, at eg havi verið á konsertferð við honum. Hann er mín stóra hetja, so tað er heilt fantastiskt, greiðir Jacob Andersen frá.

Hann stendur nú eftir sum tann seinasti og størsti, um ein so kann siga, vinnarin av sangkappingini hjá DR, Stjørna í eitt kvøld.

## Takksamur

Í løtuni hevur Jacob Andersen úr at gera, tí fyrst í apríl mánaði verður fløga hansara, Make it better, endurútgivin. Harafturat skal hann runt á konsertferðir heilt til einaferð í summar, so nú er veruliga ferð komin á innan tónleikaheimin hjá 33 ára gamla manninum úr Keypmannahavn.

- Hetta kennist so ótrúligt, framúrskarandi, og eg eri ógvuliga takksamur fyri at vera her í dag. Men tað er eisini stressandi. Eg havi úr at gera, og tað er ferð á alla tíðina, sigur Jacob.

- Eg haldi tó, at eg sum persónur havi ikki verið til reiðar fyrr enn nú. Eg dugi betri at njóta tað, men hetta hevur absolutt verið vert at bíða eftir.

Hann ásannar tó, at arbeiðið hevur við sær, at til tíðir er noyddur at vera burtur frá soninum, Malte.

- Hinvegin, so tá eg eri heima, so eri eg heima. Nú er hann eisini vorðin so gamal, at tað ber til at tosa eitt sindur í telefon saman.

Jacob greiðir frá, at hann roynir eisini at taka hann við, tá hann skal spæla til konsertir, um tað ber til.

- Eg royni bara at fáa hann at skilja, hvat tað er, eg geri. Og at eg ikki velji hann frá, men at hetta er mítt arbeiði, og soleiðis er støðan bara.

## Heilt serligt

Jacob hevur verið fleiri ferðir í Føroyum. Eisini áðrenn hann var við í Stjørna í eitt kvøld. Og onkursvegna, so venda Føroyar altíð aftur í hansara lívi.

- Orsakað av Guðrun, so venda Føroyar sjálvandi nógv aftur í mínum lívi, men eisini aðrastaðni. Óli Poulsen setti seg í samband við meg og bað meg syngja kór á fløguni hjá Sanne Salemonsen, og so er grannin hjá mær eisini føroyingur. Føroyar hanga bara við, flennir Jacob.

Keypmannahavnarin er ógvuliga glaður fyri Føroyar, tí hann heldur, at tað er nakað heilt serligt við landinum.

- Onkursvegna verði eg so skapandi, tá eg komi til Føroyar. Millum annað skrivaði eg heitislagið til fløguna hjá mær, Make it better, í Føroyum.

Hann dugir ikki heilt at seta fingurin á júst, hvat tað er við Føroyum. Men hann tykist hjartaliga bergtikin av landinum.

- Hetta ljóðar kanska eitt sindur býtt, men eg kenni meg nærri Gudi, tá eg eri í Føroyum. Kanska tað eru fjøllini, men nú komi eg so úr einum stórbýi, so tað er heilt øðrvísi at koma til Føroya.

Jacob skal nevniliga til Føroya at hava konsertir í mai mánaði, og tað gleðir hann seg nógv til. Hann greiðir frá, at hann roynir at skipa soleiðis fyri, at bæði unnustan og sonurin kunnu koma við til Føroya.

- Og so hava tit eisini tað feitasta spælistaðið, leggur hann afturat. Hann sipar her til Mentanarhúsið í Fuglafirði.

- Um tað lá í Keypmannahavn, so hevði tað verið stúgvandi fult hvørt vikuskiftið. Ljóðviðurskiftini eru jú framúr, og tað líkist eini sovorðnari lítlari rockcafé, heldur hann.

Hann er eisini ógvuliga bergtikin av føroyskum tónleiki. Hann nevnir millum annað bæði Eivør og Teit, sum tveir fantastiskar sangarar.

## Fingið sjálvsálit

Sangkappingin Stjørna í eitt kvøld hevur givið Jacob sjálvsálit, heldur hann sjálvur. Sjálvsálit at trúgva uppá tað, hann ger og lært hann at duga betri at selja seg sjálvan.

- Tað er helst tað, eg havi dugað ov illa fyrr. Eg tordi ikki, tí eg var ov bangin fyri at verða vístur burtur.

Men hóast nógvu umtaluna,